

*Einki kirkjuráðsval verður í Vesturkirkjuni hesaferð. Bert tann eini listin kom inn, tá freistin var úti týskvøldið*

# Bert ein listi til kirkjuráðið

**Kirkjufólkið í vesturbýnum í Havn sleppa ikki á kirkjuráðsval hesaferð. Bert tann eini listin kom inn, tá freistin fyri at lata listarnar inn var úti í hesi vikuni. – Onkur kann halda tað vera óheppið bara við einum lista. Men hinvegin so haldi eg, at hetta avgjørt má takast um eitt tekin um semju í Vesturkirkjuni, sigur formaðurin í valstýrinum, Signar Dam. Hann fegnast eisini um, at talið av fólki sum gongur í kirkju er alsamt vaksandi**

KIRKJURÁÐ
*Snorri Brend*

**Havn:** Týsdagin 8. november verður kirkjuráðsval kring alt landið. Og tó!

Á mongum støðum verður bara ein listi við valevnum til kirkjuráðið, og tí er langt frá á øllum støðum at kirkjufólkið sleppur til valborðið.

Men á teimum støðunum, har fleiri enn tveir listar eru, verður valið hildið henda dagin.

Eitt av teimum støðunum, har tað longu nú er greitt, at einki val verður, er í Tórshavnar vestaru kirkjusókn.

Hetta hendir, hóast fólkagrundarlagið átti at verið rættiliga stórt, og framvegis er í støðugum vøkstri.

- Her er so bara tann eini listin komin inn, sigur Signar Dam, formaður í valstýrinum fyri Vesturkirkjuna.

Av hesi orsøk verða tað sostatt valevnini á hesum lista, sum fara at manna nýggja kirkjuráðið tey komandi fýra árini.

### Fleiri ganga í kirkju

Tað er ikki at taka seg aftur í, at Vesturkirkjan er ein snøggur bygningur, sum so hábærsliga stendur í vesturbýnum í høvuðsstaðnum.

Innan er nógv gjørt við kirkjuna, men tað er uttan iva mest uttanfyri at fólk við frøi hava sæð tey arbeiðini, sum eru gjørd har.

Kirkjuráðið sjálvt hevur eisini havt síni mál at taka støðu til. Og Signar Dam heldur, at tað kirkjuráðið, sum enn situr, hevur havt eitt sera gott samstarv.

- Jú, vit hava arbeitt sera væl saman – bæði kirkjuráðið, prestarnir og kirkjufólkið. Og vit hava verið samd um tingini.

- Tí kunnu vit siga, at vit hava havt eina góða tíð her í Vesturkirkjuni, sigur Signar Dam.

Hann fegnast tó allarmest um, at talið av kirkjufólkið eisini hevur verið í støðugum vøkstri hesi seinastu árini.

- Hetta er avgjørt at gleðast um, sigur hann.

### Bert ein listi

Hesa seinast tíðina hava annars formenninir í teimum ymisku valstýrunum boðað frá um hetta komandi valið.

Tað gjørdi Signar Dam eisini. Og í lýsingini frá Tórshavnar vestaru kirkjusókn varð boðað frá, at hetta valið skuldi eftir ætlan fara fram týsdagin 8. november frá kl. 10 til 12 og síðani frá kl. 16 til 20.

Somuleiðis varð sagt frá, at valevnislistar skuldi vera formanninum í hendi seinasta týskvøld.

Men tá hann so gjørdi støðuna upp hetta kvøldið var altso bert tann eini listin komin inn. Tí verður einki val á hesum sinni.

### 12 limir

Í kunngerðini verður sagt, at í mesta lagi 18 fólk skuldu vera á listanum, og at minst tríggir og í mesta lagi 15 veljarar skuldu undirskriva listan sum stillarar.

Og hesin eini listin til komandi kirkjuráð í Vesturkirkjuni telur so 16 nøvn. Og av hesum fara so tey 12 at sita í kirkjuráðnum, saman við báðum prestunum við kirkjuna, Hera Joensen og Bergur D. Joensen.

Í kirkjuráðnum, sum enn situr eru 11 limir. Men orsakað av økta fólkatalinum í vesturbýnum í Havn er talið nú økt við einum limi, upp í 12.

Enn verður ikki upplýst, hvørji hesi fólkini á listanum eru. Men tey verða so kunngjørd seinni.

**FAKTA**

**Kirkjuráðsval**

Høvuðstreytin fyri valrætti er, at ein og hvør, sum er limur í fólkakirkjuni, og sum fyllir 18 ár í seinasta lagi valdagin 8. november 2005, hevur valrætt.

Markið millum Tórshavnar vestaru og Tórshavnar eystaru kirkjusókn er Tróndargøta-Varðagøta-Villingardalsvegur.

Øll valevnini skulu geva skrivliga váttan um, at tey vilja lata seg stilla upp. Hava tey ikki sitið í kirkjuráði áður, mugu tey vera sinnað at undirskriva ta váttan, sum kravd verður, áðrenn tey á fyrsta sinni kann taka sæti í kirkjuráðnum.

## Sama skatt í Sundalagnum

Sunda kommuna: Bygdaráðið í Sunda kommunu hevur avgjørt at skattaprosentið komandi ár verður 20,6.

Fíggjarlógin fyri 2006 javnvigar við 43,5 mió. krónum. Barnafrádrátturin er 5.000 kr.

**sb.**

**Hi-Fi**

**32" LCD Flat Sjónvarp**



10.998,-

32" LCD-Sjónvarp av merkinum Viewpia har tú fært nógv fyri pengarnar. Tað hevur eina upploysn uppá 1366 x 768, og við DVI inngangi er tað klárt til HDTV. Tað hevur tveir tunarar og eina hátalaraeffekt uppá 2x15Watt. Responstíðin er heilt niðri á 8ms!!!
Vanligur prísur 11.998,-

**Panasonic 32" Widescreen**



tilboð 5.498,-

100Hz Super Digital Scan
Nicam Stereo Ljóð
Digitalt Kamfiltur
Ótrúliga góð mynd!!!

Vanligur prísur: 5.798,-

**Lenco Minianlegg MC131**
CD, MP3, Kassettuband og Radio
USB Slot



1.198,-

**Tráðleysar oyratelefonir**
Vanligur prísur 498,-



tilboð 398,-

Á HJALLA · 188 HOYVÍK
TEL 315415 · FAX 319001
damor